# KT-Fólk

Strandfaraskip Landsins sóknast eftir einum dugnaligum KT-umsitara.

**Høvuðsuppgávurnar verða**

- servara-konfigurering, rakstur og viðlíkahald
- installatiónsuppgávur og tekniskan support av eginteldum og brúkaraforritum
- umsita trygdarskipanir
- viðlíkahald av dokumentatiónstilfari
- leggja ætlanir fyri dagføringar og útbyggingar

Umframt at hava dagligu rakstrarábyrgdina fær KT-umsitarin møguleikan at luttaka í nógvum spennandi verkætlanum. Eisini eru útbúgvingarmøguleikarnir góðir.

**Førleikakrøv**

Vit rokna við, at tú hevur:

- hóskandi edv-útbúgving
- kunnleika til netskipanir, helst Windows
- evni at arbeiða sjálvstøðugt og málrættað
- góð samstarvsevni

**Arbeiðsstaður**

Arbeiðsstaðurin er í løtuni í Tórshavn. Frá 1. januar 2008 er arbeiðsstaðurin á Tvøroyri.

**Setanartreytir**

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi fakfelag.

**Umsóknir**

Umsókn við próvskjølum skal sendast til:

Strandfaraskip Landsins
att. Starvsfólkadeildin
Postboks 88
FO-110 Tórshavn

og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 19. des 2007.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Jákup Danielsen, stjóra, á tlf. 343012 ella teldupost jda@ssl.fo.

STRANDFARASKIP LANDSINS

Strandfaraskip Landins (SSL) eru landsfyritøka undir Innlendismálaráðnum, hvørs endamál er at lúka landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi. Fyritøkan umsitur 29 farleiðir: 22 Bygdaleiðir og 7 Oyggjaleiðir. Samlaða talið av ferðafólkum við SSL í 2006 var 1,1 millión: 620 túsund við bussunum og 480 túsund við ferjunum. Talið av flutningsanleggum er 40 bussar, 8 ferjur og farmaflutningsútbúnaður. Starvsfólkini eru á leið 170 í tali, svarandi til 120 ársverk. Fyrisitingin á SSL er skipað í fimm deildir: Samferðslu-, Sjó-, Fíggjar-, Starvsfólka-, Farma- og cateringdeild.



# Tøkk til veljararnar

Tøkk til tykkum, ið stuðlaðu Fólkaflokkinum til Fólkatingsvalið

Somuleiðis ynski eg at takka tykkum øllum, sum kring landið stuðlaðu mær persónliga

Hjartans takk fyri stuðulin

RODMUNDUR NIELSEN

Vikuskiftisvaktin hjá

**SOSIALINUM & PORTALINUM**

er at hitta alt vikuskiftið á

**TELEFON 22 50 00**

Ringið um tit hava søgur, hugskot og tips ella um tit vilja kunna um fundir, tiltøk, konsertir o.a., sum fer fram kring alt landið í vikuskiftinum

VIVA



Stovnurin, ið veitir lestrarstuðul til lesandi

STUÐULSSTOVNURIN
The Faroese Student Grant Fund

## SKRIVSTOVULÆRLINGUR

Ert tú ágrýtin og hugagóð/ur? Vilt tú gerast partur av einum toymi av dugnaligum starvsfólki, ið saman virka fyri at geva lesandi góðar fíggjarligar karmar. So les víðari og send okkum eina umsókn.

**Førleikakrøv**

Vit vænta, at tú:

- Hevur eina miðnámsútbúgving við góðum úrsliti
- Hevur áhuga í skrivstovuyrkinum og arbeiðsøkinum hjá Stuðulsstovninum
- Ert fyrikomandi og hevur góð samstarvsevni

Útbúgvingin tekur 3 ár, um tú hevur FHS, 2 ár og 18 vikur um tú hevur students, HF- ella HT-próg og 2 ár, um tú hevur HH-prógv.

## MÁLSVIÐGERI

Av tí at eitt av starvsfólkum okkara fer í barnsburðarfarloyvi, er eitt áhugavert starv sum skrivstovufólk/málsviðgeri ¾ tíð leyst at søkja á Stuðulsstovninum.

Vit bjóða tær eitt ábyrgdarfult, áhugavert og fjølbroytt starv í einum stovni í menning. Tað er eitt sjálvstøðugt starv við góðum møguleikum fyri bæði persónligari og fakligari menning.

**Høvuðsuppgávur**

- Málsviðgerð í ÚS-skipanini*
- Vanligar skrivstovuuppgávur

**Førleikakrøv**

Vit vænta, at tú hevur:

- Skrivstovuútbúgving, HH/student ella líknandi
- Góðan kunnleika í at brúka edv
- Góðan kunnleika til føroyskt
- Fyrikomandi og góð samstarvsevni
- Førleika til at arbeiða sjálvstøðugt

**Setanar- og lønartreytir**

Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um alt aðalráðið og deildir/stovnar tess.

**Umsókn**

Umsókn við prógvum o.ø. skal sendast til Stuðulsstovnin og stílast til Terja á Lakjuni.

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin **10. desember 2007**.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Terja á Lakjuni, stjóra á Stuðulsstovninum, á tel. 356800 / 555080

Miðað verður ímóti at tey, ið sett verða, byrja 1. januar 2008.

** Í ÚS-skipanini verður útbúgvingarstuðul veittur til tey, ið lesa í Føroyum.*

Stuðulsstovnurin er ein stovnur undir **Mentamálaráðnum**, ið hevur til uppgávu at veita fíggjarligan stuðul til lesandi føroyingar. Á Stuðulsstovninum starvast 5 fólk. Stovnurin rindar mánaðarligan lestrarstuðul til umleið 2.000 lesandi í Føroyum og árligan ferðastuðul til umleið 1.100 lesandi uttanlands, umframt at veita lestrarstuðul til lesandi uttanfyri Norðurlond (ÚSUN). Harumframt krevur stovnurin inn lestrarlán frá umleið 2.700 persónum. Stuðulsstovnurin hevði í 2007 eina útreiðslujáttan upp á 2,9 mió. kr. og veitti uml. 92 mió. kr. í lestrarstuðli.

Hoyvíksvegur 72 : Postrúm 3279 : FO 110 Tórshavn
Tel. 356800 : Faks 356801 : studul@studul.fo : www.studul.fo